Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn
(Sambýlið á Mýrini í Hoyvík)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 59 frá 30. apríl 2018 um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á lógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg
um
at byggja ein vardan bústað í
Tórshavn"**

2. Í § 1, stk. 1 verður "tveir vardar bústaðir" broytt til: "ein vardan bústað" og "§ 32 í forsorgarlógini" broytt til: "§ 46 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

3. Í § 1, stk. 2 verður "58 mió. kr." broytt til: "46 mió. kr."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 26. januar 2021 við 31-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 26. januar 2021

stjóri

lm. nr. 63/2020